Átta tiknir:

Effektivur ferðmátari

FERÐMÁTINGAR
Stefan í Skorini

Átta bilførarar vórðu sunnunáttina tiknir av løgregluni fyri at koyra ov skjótt. Allir átta høvdu fótin so tungan á spitaranum, at teir fáa í minsta lagi treytaða frádøming av koyrikortinum, og hesin dómur verður hangandi yvir teimum í trý ár.

Ferðslupatruljan hjá løgregluni var úti við ferðmátaranum tvær ferðir sunnunáttina, og úrtøkan má sigast at hava verið góð.

Nýggi ferðmátarin hjá løgregluni vísti, at teir koyrdu ímillum 117 og 137 kilometrar um tíman. Hetta er nóg mikið at missa kortið treytað av nýggjari koyriroynd.

Ein bilførari koyrdi heilt uttan fyrilit hesa náttina. Hann varð tikin tvær ferðir, og báðu ferð var ferðin omanfyri loyvda mark. Hesin bilførari hevði frammanundan ein treytaðan dóm hangandi, og tí missir hann koyrikortið treytaleyst.

Ein bilførari, ið varð tikin í Kaldbaksbotni, koyrdi 117 kilometrar um tíman, og hann hevði eina promillu omanfyri 1.

Vakthavandi á løgreglustøðini sigur, at tað verður koyrt alt ov skjótt á føroysku vegunum. Flestu bilførarar hava tann hugburð, at tað hevur ongan týdning, um ein koyrir ov skjótt, tí ein bilførari missir ikki koyrikortið í fyrsta umfari.

Ræðslan fyri at missa kortið er burtur, og tað kann hava við sær, at førarar ikki leggja í, um teir verða tiknir. Ferðslulógin er tó so, at førarin fær ein treytaðan dóm, sum ikki fellur burtur fyrr enn trý ár seinni, men tað hugsa førarar ikki um.

Herverk á fornminni

HERVERK
Stefan í Skorini

Eini gomul hús heima á Sandi fáa ikki frið. Hetta vikuskifti er herverk framt á húsini í Koytu, ið eru friðað, og sum fornminnissavnið arbeiðir at umvæla.

Sýslumaðurin á Sandi sigur, at hetta ikki er fyrstu ferð, at júst hesi húsini eru fyri herverki. Tað er komið fyri einar tríggjar ferðir fyrr, at onkur hevur gjørt seg inn á tey.

Hetta er sera harmiligt, tí hesi húsini eru millum tey elstu í bygdini og á oynni. Sagt verður, at herverki ikki er tilvildarligt, men at fólk hava verið á staðnum bara við tí fyri eyga. Einki er at taka í húsunum, so talan er ikki um innbrot.

Fornfrøðingurin Símun Arge sigur, at elstu partarnir av húsunum eru frá 1600-talinum, og teir yngstu partarnir eru frá fyrst í 1800-talinum.

Tveir tiknir fyri spirituskoyring

LØGREGLUTÍÐINDI
Stefan í Skorini

Tvey ferðsluóhapp hava verið um vikuskiftið, har førararnir hava verið ávirkaðir av rúsdrekka.

Annað óhappið hendi á hospitalsvegnum sunnunáttina. Ein bilur heldur seg ov nær við bilin frammanfyri, og teir stoyta saman. Tá løgreglan kemur á staðið, vísir tað seg, at førarin varð ávirkaður av rúsdrekka. Mátingin av alkoholinnihaldinum í blóðinum vísti, at hann hevði eina promillu, sum var omanfyri 1.

Hitt óhappið hendi fríggjanáttina á Bursatanga. Førarin á einum skutara varnast ikki, at bilurin frammanfyri steðgar. Hann stoytir saman við bilinum, og førarin verður slongdur av skutaranum.

Førarin fær ikki stórvegis skaða av óhappinum, men tað vísir seg, at hann er skítfullur. Løgreglan upplýsir, at promillan var omanfyri 3, og tá er ikki ráðiligt at ferðast á skutara. Førarin fær bara bót fyri hetta brotið á lógina.

Hesin bilurin var sunnunáttina við í einum ferðsluóhappi á hospitalsvegnum. Førarin varð ávirkaður av rúsdrekka og missir væntandi koyrikortið treytaleyst

Mynd: Eirikur Lindenskov

NORA og
Northern Periphery Programme

Tvær menningarætlanir, ið stuðla millumtjóða samstarvi í
- menning av felags loyanum,
- samskifti um egnar royndir
- fremjing av felaga nýskapandi verkætlanum,
- stovnan av netverkum v.m.

Stuðul til millumtjóða netverks- og verkætlanarsamstarv

Nú kann søkjast um stuðul til samstarv millum virkir, myndugleikar og granskingar- og útbúgvingarstovnar í norðuratlantiska økinum, Norðurskandinavia og Skotlandi.

NORA (Norrønt Atlantssamstarv):

Norðurlendsk menningarætlan:
Samstarvslond: Føroyar, Grønland, Ísland og Norður- og Vesturnorra.
Endamál: Stovnan av netverkum og stuðul til nýhugsandi tilgongdir og vinnumenning
Stuðul: Íalt 4-5 mió. DKK um árið
Umsøkjarar: Virkir, granskingar- og menningarstovnar, myndugleikar o.fl.
Verkætlanarslag: Samstarvsverkætlanir, netverkssamstarv, menning av verkætlanum, gransking og greiningar
Aðrar treytir: M.a. samstarv millum minst tvey NORA-lond. Í mesta lagi 50% stuðul í 3 ár.

Umsókn: Umsókn á skandinaviskum máli skal minst fevna um:
- lýsing av verkætlanini, málsetningi, væntaðum úrsliti og ávirkan og íkasti til norðuratlantisku menningina
- kostnaðarætlan
- tíðarætlan

UMSÓKNIR til NORA:
Móttøkufreist: 1. apríl 2002
NORA
Bryggjubakki 12
Box 259
FO-110 Tórshavn
Tel: +298 31 40 28
Fax: +298 31 04 59
e-mail: nora@nora.fo
www.nora.fo

Northern Periphery Programme (Norðurmót ætlanin):

Evropeisk menningarætlan:
Samstarvslond: Føroyar, Grønland, Ísland, Norður-norra, Norðursvøríki, Norðurfinnland, Norðurskotland og Útnorður-Russland
Endamál: Stovnan av netverkum, stuðul til nýskapandi verkætlanir og samskifti um egnar royndir.
Samstarvsøki: Flutningur, kunningartøkni, burðardygg nýtsla av tilfeingi, virkismenning og menning av nærsamfelagum
Stuðul: Í alt u. 27 mió. DKK um árið í 2001-2006.
Samstarvspartar: Myndugleikar, virkir, gran-skingar- og menningarstovnar, áhugafelagsskapir o.fl.
Verkætlanarslag: Samstarvsverkætlanir, smáverkætlanir viðv. leiting eftir samstarvspartum og menning av nýggjum verkætlanum
Annað: Krav um samstarv millum minst trý lond (harav eitt ES-land). Max. 50-60% í stuðli, norðuratlantisk luttøka gevur fyrimun

Umsókn: Umsóknarblað á enskum og kunningartilfar fæst á heimasíðuni: www.northernperiphery.net

UMSÓKNIR til NORÐURMÓT ÆTLANINA:
Móttøkufreist: 22. marts kl. 18.00
NORTHERN PERIPHERY PROGRAMME
Hovedvagtsgade 8, 2. sal
DK-1103 København K
Tel. + 45 33 32 00 66, + 45 20 94 52 27
Fax. + 45 33 93 85 75
E-mail: tuovi.harma@npp2.net
www.northernperiphery.net

Í nøkrum førum fæst partvís figging frá NORA til NORÐURMÓT-verkætlanir. Umsóknir til tílíka figging skulu vera NORA í hendi í seinasta lagi 25. februar 2002.
Umsøkjandi er tí at seta seg í samband við NORA, áðrenn umsókn verður latin inn.

Kunningarfundur
Kunningarfundur verður hósdagin 14. februar kl. 14:00 á Parnassinum Hotel Hafnia. Kaspar Lytthans, stjóri hjá NORA greiðir frá um NORA og Norðurmót ætlanirnar og teir samstarvsmøguleikar, sum hesar geva.

Partenariat
NORTHERN PERIPHERY PROGRAMME heldur tveir fundir í 2002 fyri møguligar umsøkjarar.
Tað fyrra av hesum sonevndu "partenariatunum" verður í Rovaniemi í Finnlandi tann 28. februar og 1. mars. Upplýsingar og tekning á heimasíðuni www.northernperiphery.net.